| LYRICS | |
|---|---|
| **Lyrics:** | Steintór Rasmussen |
| **Music:** | Steintór Rasmussen |
| **Original Lyrics (in Faroese language)** | **English Translation** |
| Enn eri eg ungur | I am still young |
| Og enn í góðum lag | And I am still in a good condition |
| Mær tørvar einki føðibræv | I do not need a birth certificate |
| Til at prógva tað | To prove my heritage |
| Eg minnist ei mín barnadóp | I do not remember my baptism |
| Og mína grulvutíð | Nor my crawling years |
| Nú eri eg nóg vaksin | Now I am adult enough |
| Til at skilja hvat og hví | To understand „what" and „why" |
| | |
| Eg vil elska, eg vil syngja | I want to love, I want to sing |
| Eg vil fevna kærleikan | I want to embrace the love |
| Eg vil leita til tey støð | I want to seek out the places |
| Har eg finni sannleikan | Where I can find the whole truth |
| | |
| Lívið er mítt listarverk | My life is my masterpiece |
| Eg máli jú hvønn dag | I am painting every day |
| Um eg fylli hundrað ár | Even if I make it to a hundred years |
| Ei liðugt verður tað | My painting won't be finished |
| Vónin er at myndin mín | My hope is that my painting |
| Ein mildan skugga fær | Gets a mild shade |
| Tá fólk úr øllum heiminum | When the people of the world |
| Frælsið ogna sær | Acquire freedom |
| | |
| Eg vil elska, eg vil liva | I want to love, I want to live |
| Eg vil syngja friðarlag | I want to sing a song of peace |
| Saman við so mongum menniskjum | Together with as many people |
| Sum altíð vilja tað…. | Who always want it… |
| | |
| Vilja gráta, vilja flenna | Who want to cry, who want to love |
| Ynska frið í heiminum | I wish peace for the world |
| Og við álit' á hvønn annan | And that in trust of each other |
| Læra mangt av lívinum | We learn how to live! |